

*Ein av mongu strondunum í Mallorka*

vindeygum troka seg saman. Bert ein vegur fer gjøgnum bygdina og endar niðri á keiðini, har eini 10 smáir plastbátar liggja uppi á landi. Kortini hevur Port de Valdemossa bæði matstovu og barr. Eg og Bárður stuðlaðu matstovuni við at keypa okkum tann spanska rættin paella og eina kalda San Miguel øl afturvið. Nógv hús stóðu tóm og eg hugsaði við mær sjálvum, at tað eru ikki bara føroyingar, sum hava trupulleikar við at fáa fólk at støðast á avbyrgdum støðum. Aðrir turistar høvdu sjálvandi eisini funnið henda goymda blett. Onkur snorklaði í livandi bláa havinum og aðrir lógu og sólaðu sær. Upprunaliga er Port de Valdemossa ein gamal lumpibýur ella dupultbýur. Tann "rætti" býurin er fjallabýurin Valdemossa. Við havsíðuna á Mallorka liggja hesir lumpibýir, sum byrja við Port t.d. Port de Valdemossa, Port de Sollér, Port d`Andrax og Port d´Alcudia. Røttu býirnir eita so Valdemossa, Sollér, Andrax og Alcudia. Teir liggja longri inni í landinum og betri goymdir. Hetta er ein leivd frá gamlari tíð, tá ið Mallorka í tíð og ótíð var álopin av sjórænarum. Vónin var, at sjóræningarnir ikki funnu røttu býirnar, men bert hildu seg til at ræna lumpibýirnar. Eg fór at hugsa, um føroyingar í gamlari tíð hava vitað um hesa loysn. Føroyska landslagið er tó lítið og nakið. Tað hevði verið torført at havt goymdar bygdir í Føroyum.

## Vit og Chopin

Restina av degnum vitjaðu vit aðrar hugnaligar býir, eitt nú romantiska fjallabýin Valdemossa, sum er vakrasti býur á oynni. Turisman í Mallorka byrjaði í hesum býi, tá ið kenda tónaskaldið Frédérik Chopin og hansara elskarinna rithøvundurin George Sand búðu har ein myrkan vetur í 1838-1839. Tey leigaðu nøkur kømur í einum gomlum klostri. Lokalu íbúgvarnir royndu at umganga tey og tey høvdu eina elendiga feriu, sum Sand skrivar í síni bók "Ein vetur á Mallorka". Bókin hevur lítið gott at bera fólkinum á oynni, men lovprísar vøkru náttúruni. Bókin fæst í øllum handlum í Mallorka. Okkara feria var tó alt annað enn elendig. Mallorka er avgjørt verd at vitja, sjálvt um hon er sprenfull við turistum. Tveir sera vælnøgdir og nakað væl brúnari føroyingar sótu í Atlantic ávegis til Føroyar sunnukvøldið tann 20. juli. Bárður læs nú Camillu Läckberg og eg Lizu Marklund. Lagið á Bárði var avbera gott, hann hevði sett seg væl til rættis við kalvados, kaffi og eini cadbury sjokolátu. Eg mátti geva H.C. Andersen rætt í, at at ferðast er at liva, men tað er eisini gott at koma heim aftur. Vit komu til Føroyar, júst tá ið sólin var á veg niður. Tað var ikki eitt skíggj at hóma og himmalin brendi allur, sum hann var. Síðsta sólarljósið spegladi sær í havinum og á veingjunum á flogfarinum. Vit sóu allar oyggjarnar heilt frá Suðuroynni til Norðuroyggjar, tað var himmalskt. Dagin eftir legði mjørkin seg sum eitt lok yvir Havnina.



*Eg njóti bergtakandi náttúruna uppi í fjøllunum*